# Ítróttarblaðið

**Ítróttartoymið á Sosialinum:**


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Atli tapti móti oddaliði

Føroyski landsliðsleikarin var á miðvøllinum allan dystin, tá hann og FC Roskilde taptu 0-2 á útivølli móti AB. AB liggur á fjórða plássi í næstbestu donsku fótbóltsdeildini, men er einans tvey stig frá uppflytingarplássi. Tískil var tað eitt ógvuliga tendrað heimalið, ið FC Roskilde møtti og sum teir eisini máttu lúta fyri. Tíbetur fyri Atla Danielsen spældu Thisted og Hvidovre, sum liggja beint aftanfyri FC Roskilde, javnt. Tað merkir, at hvørki av hesum báðum liðum yvirhálaðu FC Roskilde, sum sostatt framvegis er 11. plássi, men við bara trimum stigum niður til niðurflytingarmarkið. Tað eru bara tvey umfør eftir at spæla í donsku 1. division. Næsta vikuskifti vitja Atli Danielsen og teir hjá Hvidovre, sum liggur eitt stig aftanfyri FC Roskilde. Við einum sigri kunnu teir sjálvir tryggja sær pláss í deildini aftur næsta ár, og tí verður talan um ein sannan botngysara sunnudagin.

# Føroyskt drama í St. Pølten

**IRONMAN** Fyri stuttum tók Guðmundur Joensen lut í hálvari IronMan kapping í Eysturríki, har hann datt álvarsliga. Føroyski íðkarin valdi kortini at fullføra teinin

Heri Simonsen

Kappingin, sum hoyvíkingurin, Guðmundur Joensen tók lut í var ein sonevndur »Hálvur IronMan«. Kappingin fevnir um tríggjar greinar, svimjing, súkkling og renning. Fyrst var talan um 1.900 metrar svimjing, súkklast skuldu 90 kilometrar, og so varð endað við einum hálvum marathon teini, sum var umleið 21,1 kilometur til longdar. Gudmundur greiðir frá, at talan er um eina kapping ímóti urinum, og at tað ráddi um at koyra so skjótt, sum møguligt.

### Rímuliga slætt

Hóast talan var um eina kapping í fjallalandinum, Eysturríki, so var talan um ein rímuliga slættan tein. Teir fyrstu 15 kilometrarnir vóru á einum motorvegi, og seinni á teininum fóru íðkarnir upp í hæddirnar. Hæddir sum kunnu mátast við hægstu hæddirnar í Føroyum. Talan var um eitt sterkt felt, sum var býtt upp í ymiskar bólkar. Guðmundur sjálvur tók lut í bólkinum 25-29 ár. Ein bólkur har íðkarnir eru í góðum aldri. Tað vóru tilmeldaðir eitt stað millum 200 og 300 íðkarar í bólkinum hjá Guðmundi. Umleið 3.000 íðkarar vóru við í teimum ymisku aldursbólkunum.

### Long fyrireiking

Guðmundur hevur leingi fyrireikað seg til hesa kappingini. Hann hevur fyrireikað seg alt síðani IronMan-sesongin endaði í fjør. Guðmundur hevur hildið seg í form við styrkisvenjing og spinning gjøgnum veturin, og vandi hann fyrst 10-15 tímar gjøgnum vikuna. Aftaná 1. januar hevur Guðmundur økt um venjingina, og hevur hann ligið um teir 20 tímarnar í venjing hvørja viku. Tað hevur verið tungt, men Guðmundur hevur verið bevístur um hvat hann hevur arbeitt fram ímóti. Guðmundur sigur, at nógv venjing og seriøsitetur hava ligið aftanfyri fyrireikingarnar. Guðmundur hevði sett sær eitt greitt mál fyri kappingina í St. Pølten, og tað var at vinna bólkin hjá teimum 25-29 ára gomlu. Venjingarnar fram til kappingina boðaðu eisini frá góðum, og Guðmundur metir sjálvur, at hann var í sínum besta formi nakrantíð, men so hendi tíverri tað sum ikki má henda.

**»Eg lá nummar eitt, dreiv á og veruliga føldi, at hetta var mín dagur, men tá datt eg í einari rundkoyring**

